



LÓG UM BURÐARDYGGA FERÐAVINNU

Hagafelagið 29.04.2024



TILKNÝTI TIL NÁTTÚRUNA

Endamál felagsins er at virka fyri rættinum at fara í hagan, úr fjøru niðan á fjallatind. Felagið skal virka fyri at varðveita og menna eitt fjølbroytt, heilsugott og virkið lív í haganum umframt at arbeiða fyri at verja náttúruna

Vit mugu ansa eftir at komandi ætttarlið ikki verða fremmandagjørd frá náttúruni, sum hevur so nógv at geva okkum, bæði í mun til okkara samleika, sjálvbjargni, trivna og heilsu

FØROYAR - UTTAN ALRAMANNARÆTT

Í mai mánað fær Hagafelagið vitjan av Svensk Friluftsliv, sum kemur á kanningarvitjan, tí Føroyar eru einasta norðurland, ið ikki hevur lógarásettan alramannarætt



ALLÝSING AV ALRAMANNARÆTTINUM

Marianne Reusch, sum er PhD í “rettsvitenskap”, og sum hevur skrivað bólkina Allemannsretten Friluftslivets retts-grunnlag , lýsir hugtakið alramannarættur, sum

rætturin, ið øll hava, til at dvølja, at flyta seg og vera virkin í náttúruni óheft av ognarrættinum





LÓGARTRYGGJAÐ ATGONGD TIL NÁTTÚRUNA

§ 3. Við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í hesi løgtingslóg, í reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg ella í øðrum løgtingslógum og fyriskipanum, er einum og hvørjum frítt at ferðast uttangarðs og fram við strondini.

§ 4. Øll, sum ferðast ella uppihalda sær uttangarðs, skulu hava fyrilit og fara væl um, so at tey ikki eru eigara, brúkara, fenaði, náttúru, mentanararvi ella øðrum at skaða ella til ampa.

Ásetingar í §§ 3 & 4 líkjast orðingum í Norsk Friluftslov

Lov om friluftslivet (friluftsloven) - Lovdata

Allemannsretten – rett til fri ferdsel og opphold – Lovdata



Official James Bond Tombstone

NÝGGJ § 3 – ALRAMANNARÆTTUR?

§ 3. Við teimum avmarkingum og skyldum,

sum eru ásettar í hesi løgtingslóg, í reglum,

givnar við heimild í hesi løgtingslóg ella í øðrum løgtingslógum og fyriskipanum,

kunnu ferðafólk ferðast til gongu undir egnari ábyrgd eftir bygdagøtum,

uttangarðs og fram við strondini.

MAGNUS LÓGBØTARI - LANDSLÓGIN

Norðmenn hátíðarhalda Landslóg Magnus Lógbøtara frá 1274. Lógin var eisini galdandi í Føroyum og Íslandi og Seyðabrævið frá 1298 er partur av sama lógarverki

Týdningarmikil framstig við landslógini vóru, at fátæk fingu lógarverju og kvinnur arvarætt.

Óbeinleiðis staðfesti lógin rættin hjá einum og hvørjum til frítt at flyta seg. Tann rætturin var sambært Reusch (2012) so grundleggjandi og sjálvsagdur, at hann ikki varð skrivaður beinleiðis í lógina.

https://www.nb.no/landslovjubileet2024/



LANDSLOV JUBILEET
1274 2024

Hvis noen drar over andres eiendom langs rette veier, da kan han skyte ekorn som han ser at hundene har ferten av.





[Landslagsbolken, kapittel 60]

Nasjonalbiblioteket

GONGURÆTTUR OG OGNARRÆTTUR

Håvard Steinsholt, førsteamanuensis á Norges miljø og biovitenskapelige universitet (NMBU), sigur í fyrilestri á netinum, at í Evropa og í nógvum øðrum londum, er gongurættur ikki knýttur at ognarrætti.


Hóast eigari hevur nógv rættindi knýtt at ognini, er flytføri vanliga ikki ein framíhjárættur hjá eigara.



AT TULKA PRAGMATISKT?

Í fjør vórðu tveir føroyingar meldaðir fyri at fara í hagan. Nú er málið slept.

Grundgevingin hjá politiinum fyri at sleppa málinum, er “at gongd í haga ikki revsast, tá ið tey, sum eiga hagan, ikki frammanundan hava boðað óviðkomandi frá, at tey ikki skulu fara í hagan.”



Grundgevingar fyri at sleppa málinum

Orsøkin til, at málið er slept, er í høvuðsheitum, at gongd í haga ikki revsast, tá ið tey, sum eiga hagan, ikki frammanundan hava boðað óviðkomandi frá, at tey ikki skulu fara í hagan. Grundgevingarnar eru nærri lýstar í málinum.

Fremjing av innlitinum

Sambært § 51, stk. 6 í rættargangslógini, er tað tann myndugleiki, sum viðger eina innlitsumbøn, ið ger av, um innlit skal gevast við, at málið verður gjøgnumgingið á staðnum (gennemsyn) ella við at avrit verður latið tí, sum biður um innlit.

angsstøðið, at málini verða gjøgnumgingin á staðnum. Vísir tað seg, tá ið málið t tað eru ávís skjøl, sum tú hevur serligan áhuga í, kunnu tey møguliga grundað á , verða latin tær í avriti.

í samband við leiðsluskrivstovuna, á tlf. nr. 351432 at avtala eina tíð at tið.

FØROYA POLITI

Dagfesting: 09-04-2024
Skrás.nr.: 2024-065533

Leiðsluskrivstova

Húsagøta 3
Postboks 3018
FO-110 Tórshavn

Telefon: +298 35

Vinarliga

Birita Biskopstø
Stjóri á Leiðsluskrivstovuni

Masa Kallsberg
Løgfrøðilesandi

ið um tvey fólk, sum vórðu meldað t

jølini í málinum umframt útskrift f

álinum.

023, og fingið noktandi svar tann

plýsa, at málið, sum hevur j.nr. 56

Síða 2



VERJA FÓLKARÆÐIÐ

Um bøndur og festarar frammihjá gera av, hvør sleppur út í náttúruna, nær og enntá at rindast skal fyri atgongd, flyta vit okkum burtur frá týðandi fólkarættisligum meginreglum, har jørð ikki er eitt legitimt valdsráð og at náttúran er okkara.





RINDA FYRI TÆNASTU

Hagafelagið tekur undir við ásetinunum í §12, um at gjaldsportur og gjaldsbúðir skulu verða ólógligar

AT EGGJA OG KUNNA

Gerð av gøtum er fremsta tiltak, ið okkara grannalond brúka til at skipa gongd í økjum við nógvum ferðafólkavitjanum. Royndirnar vísa, at tá gøtur verða gjørdar, ganga fólk heldur eftir gøtunum enn við síðurnar av teimum.

Eisini verða ferðafólk og íbúgvar kunnað um, hvussu ein ber seg at í náttúruni. T.d. hava skotar *Scottish Outddor Access Code* og norðmenn *Fjellvett-reglar*.

Hagafelagið mælir til, at land og kommunu nýta somu framferð sum okkara grannar, við at eggja og kunna ferðafólk um hóskandi atburð í náttúruni (mynd frá Preikestolen í Norra)



FJELLVETT-REGLURNAR

https://www.dnt.no/fjellvettreglene/



SCOTTISH OUTDOOR ACCESS CODE

https://www.outdooraccess-scotland.scot/enjoying-scotlands-outdoors?utm_source=Homepage&utm_medium=SOACwebsite&utm_campaign=Home_Hero_teaser_SOACoutdoors_02Apr2021



Care for the environment



Respect the interests of others



Be responsible for your own actions

NÁTTÚRUGJALD, ALMENNAR GØTUR V.M.

Hagafelagið tekur ikki undir við uppskotinum til býti av ferðavinnugjaldinum og heldur, at øll upphæddin skal fara til at bøta um fótafarið hjá teimum vitjandi.

Eisini er felagið ivasamt, um tað er rætt, at limir í staðbundnu nevndini skulu veljast gjøgnum eina institutión, ið hoyrir landbúnaðinum til.


https://kvf.fo/node/164853

SHERPA-TRAPPAN – DØMI UM KOMMUNALT FRAMTAK

Sherpa-trappan liðug


Fyra menn úr Nepal hava í seinastuni arbeitt við at byggja eina Sherpa-trappu í niðurgongdini í Hvannhaga.

Krista Johnsdóttir Kreutzmann



NÁTT Í NÁTTÚRUNI – DØMI UM NORÐURLENSKT SAMSTARV

HTTPS://NIGHTINNATURE.COM/



LEINKI TIL FERÐAVINNULÓGINA

https://www.logting.fo/mal/mal/?id=10797